| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**13. desember 2007** | Blað nr.: **7240**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **13. desember 2007**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 182/07-198/07**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Marin Katrina Frýdal
Hildur Eyðunsdóttir
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Edvard í Skorðini Joensen

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagskránna.**

**183/07** **<u>2006-1856</u>**

**<u>Útstykking í Nólsoy</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Av tí at fólk í Nólsoy hava spurt seg fyri hjá kommununi um grundstykki og hava fingið at vita, at eingin útstykking verður framd í bræði, vilja staðbundnu limirnir hava greitt at vita, hvørjar ætlanir kommunan hevur hesum viðvíkjandi.

Eisini vilja teir vita, hvussu er við ætlanini um randarhús og um til ber at keypa grundstykki uttan fyri hesa ætlan.

**Nólsoyarnevndin 13. juni 2006:** Nevndin mælir plandeildini til at gera eina útstykkingarætlan fyri økið, sum liggur oman fyri barnagarðin.

Kommunan eigur lendið, matr. nr. 159e.

**Ískoyti:**
Málið liggur í byggi- og býarskipanardeildini.

**Nólsoyarnevndin 12. september 2006:** Kunna varð um, at málið kemur fyri á fyrst komandi fundi í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Í Byggisamtyktini fyri Nólsoy, kapittul IV § 18. øki A:Sethús stendur:

*Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m$^2$ til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggja ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 400 m$^2$, tó í minsta lagi 320 m$^2$ fyri serhús (einhúskishús) og 260 m$^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at útstykking verður samtykt sambært korti nr. 2006-1856/3 og send út til projekteringar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað projekteringina av útstykkingini út. Sí hjálagt yvirlit yvir innkomin tilboð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin koma við tilmæli til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 15. januar 2007:** Nevndin samtykti at mæla til at taka av lægsta tilboðnum frá HMP konsult.

Harumframt mælti nevndin til at leggja málið fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og leggja út fyri kostnaðin.

**Ískoyti:**
HMP hevur gjørt projekt til útstykkingina og gjørt útbjóðingartilfar. Aftaná projektgransking er projektið klárt at bjóða út. Sambært fyribils kostnaðarmeting verður samlaði kostnaðurin:

Við neyðugar vegaføring: 2.447.374 kr. u/mvg svarandi til 2.600.334 kr. v.mvg.
Fermetraprísur fyri grundstykkini kemur við hesi loysn at verða uml. kr. 600,00.
Við samlað vegaføring:3.550.766 kr. u/mvg svarandi til 3.772.688 kr.v mvg.
(Sí skjal nr.1 og 2). Fermetraprísur fyri grundstykkini kemur við hesi loysn at verða uml. kr. 850,00.

**Tilmæli:**
Býararkitektin og tekniski stjórin mæla til at velja uppskot nr.1 og at bjóða arbeiðið við útstykkingini út sum skjótast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 7. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, soleiðis at fyriliggjandi útstykkingarætlan rindar um helvtina av vegaføringini í uppskoti 1. Heitt verður á umsitingina um at fáa til vega útstykkingarætlan eystanfyri vegin, og at javna írestandi útleggi á hana. Harumframt mælti nevndin at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**

Ásannandi at prísurin pr.m² verður rættiliga høgur eftir verandi útstykkingarætlan, hevur umsitingin gjørt broytingaruppskot til ætlanina, soleiðis at grundstykkir verða báðumegin vegin. Eitt vanligt grundstykki á uml. 450 m² og 14 grundstykki á min. 260 m² verður soleiðis lagt afturat verandi uppskot. Hetta krevur tó at byggisamtyktin verður broytt og at kommunan ognar sær uml. 2650 m² av festijørð fra Føroya Jarðagrunni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broyttu útstykkingar ætlan sambært kortskjal nr. 2, og at byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjal 1 og at byggi- og býarskipanarnevndin mælir fíggjarnevndini til at søkja Jarðargrunnin um keyp av 1400 m² av matr. nr 108 a, 1250 m² av matr.nr.107a og Vatnfelagið um keyp av matr.164 sum er 12 m².

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at taka upp samráðingar um keyp av økjunum.

**Nólsoyarnevndin 4. september 2007:** Skrivarin kunnaði um verkætlanina og tíðarætlan.

**Býráðið 22. november 2007:** Tikið av skrá.

**Nólsoyarnevndin 27. november 2007:** Michael Jacobæus kunnaði um verkætlania.

Trupulleikar eru við helling av vegnum, sum samstundis merkir eitt grundstykki minni. Hetta kemur eisini, at ávirka tíðarætlanina. Arbeitt verður víðari við verkætlanini.

Frá tí at verkætlanin verður sett í verk, gongur umleið 1 ár til stykkini eru klár.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**184/07** **<u>2001-1314/113 SG</u>**

**<u>Skarðshjalli - útstykkingarætlan</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
HMP-Consult hevur gjørt forprojekt, sum fatar um 23 vinnustykki úr 2010 m² upp í 3900 m² á Skarðshjalla.

Í forprojektinum eru eisini dømi um longdarskurð og tvørskurð í vegi. Byggi- og býarskipanardeildin metir, at forprojektið lýkur treytirnar, ið vóru settar tí projekterandi, og metir tí, at projekteringin eigur at halda fram eftir sama leisti sum higartil. Eisini vísir projektið, at arbeiðið kann gerast í trimum byggistigum við ávikavist 7,9 og 7 stykkjum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at forprojektið verður góðkent, og at HMP-Consult fær boð um at halda fram við projekteringini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. februar 2002:** Samtykt at góðkenna ætlanina, tó soleiðis at tey størstu stykkini verða gjørd minni, soleiðis at fleiri stykki fáast burturúr, og at fleiri stykki verða áleið 2000 m².

**Ískoyti:**
Projektið, ið HMP Consult hevur gjørt, er nú klárt at bjóða út. Í tí ambandi er neyðugt, at kommunan ognar sær økið, ið er umleið 170.000 m² til støddar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at fíggjarnevndin samtykkir at seta av pening til keyp av øki á Skarðshjalla, víst á tekning, dagfest 25. januar 2002.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2002:** Samtykt at mæla býráðnum til at kommunan ognar sær økið.

**Býráðið 20. juni 2002:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanini hjá Landsverksfrøðinginum at broyta linjuføringina á ytra Ringvegi at verða ímillum á Hjalla og Skarðshjalla hevur verið neyðugt at broyta atkomuviðurskiftini til nýggju útstykkingina. Broytta projektið verður framlagt á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna broytta projektið og at arbeiðið verður boðið út.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. oktober 2002:** Útsett

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. november 2002:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum.

**Keyp av øki á Skarðshjalla til ídnaðarøki.**

Jarðarráðið hevur í skrivi, dagfest 29. mars 2003, sent býráðnum hesar viðmerkingar frá festaranum:

"Um so er at Føroya jarðarráð letur kommununi vinnustykki á Skarðshjalla, vil undirritaði treytað sær, at seyðasmoga verður gjørd á Kallnesskarði til seyð og neyt at rása ígjøgnum. Øll mold, ið ikki má nýtast aftur á staðnum, verður koyrd niðan á Vatnskarðar og slætta út til at gera til bø, um festarin ynskir tað."

Biðið verður um býráðsins viðmerkingar.

**Fíggjarnevndin 3. apríl 2003:** Samtykt at mæla býráðnum til at kommunan ognar sær lendið fyri kr. 45,00 pr. $m^2$ umframt kr. 3,50 pr. $m^2$ fyri vetrarbit og við teimum treytum sum festarin setir.

**Býráðið 10. apríl 2003:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**<u>Vinnustykki á Skarðshjalla – 1. byggistig</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í samband við ústykkingina til vinnustykki inni á Skarðshjalla, hevur arbeiðstakarin rent seg í eina royðulind, og hevur hetta við sær ein meirkostnað fri byggibúningina.

Ráðgevin HMP-Consult hevur gjørt eina meting í málinum og hevur sent umsitingini tilmæli, sum er grundað á, at royðan ikki er hóskandi tilfar sum fyllu í sjálvum sær, men er tó fyri ein part blandaður við grótfylluna fyri at sleppa undan at koyra alt burtur. Tilmæli er soljóðandi:

“ Ein nýggj meting av royðu og nøgdum á Skarðshjalla er gjørd.

Av tí at meira er sprongt enn ætlað við at spreingja vinnuøkini plant v.m., verður mett at nokk av gróti er á Skarðshjalla og tí verður ikki neyðugt at flyta grót til økið.

Neyðugt verður tó at koyra eini 3000 $m^3$ av royðugróti niðan í Húsahagan, og kemur hetta at kosta um 270.000 kr. u/mvg.

Meira er sprongt enn ætlað, hetta er mett til at vera um 6000 $m^3$ og kemur at kosta um 250.000 kr. u/mvg.

Meira av mold er eisini flutt niðan í Húsahagan, mett til um 3500 $m^3$ og kemur at kosta um 180.000 kr. u/mvg.

HMP hevur ikki fingið allar uppmátingar frá Munin enn.”

Hetta merkir, at ein meirkostnaður uppá 700.000 kr.
Útstykkingin er uppá fyribils 7 út av samlað 28 stykkjum.
Hetta merkir, at tey 7 stykkini, ið eru uml. 17.350 $m^2$ tilsamans skulu bera ein meirkostnað uppá 100.000 kr/pr. stykkið - ella (700.000 kr/ 17.350 $m^2$) uml. 40 kr/$m^2$.

Hjálagt er støðumynd, ið lýsir samlaðu útstykkingina.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at játta neyðugu peningin at gera byggibúningina, so at kommunan kann selja stykkini og fáa pengarnar inn aftur.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**<u>Ásetan av prísi fyri vinnustykki á Skarðshjalla</u>.**

Tilmæli kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at áseta søluprísin til kr. 545,63 umframt keypsprís fyri alt lendið lutað á samlaðu víddina á grundstykkjunum.

**Ískoyti:**
1. byggistig er avhendað og arbeitt verður í løtuni við at selja stykkini.

Vísandi til bíðilistan hjá TK upp á vinnustykkir, mælir býararkitekturin til at farið verður undir víðari útstykking inni á Skarðshjalla.

Hjálagt er kort sum vísir samlaða útstykkingarætlanina. J. nr. 200101314, dagfest 19. 09.2005.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at nevndin samtykkir at lata gera projektering av næsta stig av samlaða útstykkingarætlanini, sambært mannagongd hjá TK um ger av verkætlanum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Nevndin samtykti eisini at møguleiki skal verða fyri smærri stykkjum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at TK arbeiðir við at selja stykkini, sum vóru í 1. stig, hevur samskiftið við møguligar keyparar víst, at ynskiligt er at luta gjørdu stykkini sundur í minni eindir.

Hesum hevur umsitingin roynt at gingið á møti, í stóran mun, og nýggj útstykkingarskipan er fingin til vega.

Ásannnandi at broytingar í liðugt gjørda verkætlan, nærum altíð hava avleiðingar við sær, metir býararkitekturin at allar broytingar í sambandi við tekniskar leiðingar v.m. bert eiga at verða framdar, eftir ávísing av, og í tøttum samstarvi við teknisku deild.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at nevndin góðtekur nýggju ústykkingarskipanina, og at nevndin beinir málið í tekninsku nevnd at gera viðmerkingar til fíggjarnevndina og býráðið í sambandi við treytir fyri sølu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitining hevur, grundað á umsóknir frá umsøkjarum til vinnustykkir, arbeitt við at tillaga víðari útstykkingina av vinnustykkjunum inni á Skarðshjalla, byggistigini 2 og 3, sum hóskandi til umsøkjararnar á bíðilistanum hjá TK.

**Tilmæli:**
Býarrkitekurin mælir til at nevndin góðkennir nýggja uppskotið til útstykking fyri byggistigini 2 og 3 á Skarðshjalla, soleiðis at arbeiðast kann við at projektera og bjóða út vegagerðina, og partar av vinnustykkinum, meðan farast kann undir at selja aðrar partar til størri vinnustykkir sum óbyggibúnaðið stykkir. Hjálagt er kortskjal, dagfest 02.10.2006 j.nr 2001-1314.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. oktober 2006:** Nevndin samtykti at biðja um frágreiðing frá umsitingini av keyp og sølu.

**Byggi og býarskipanarevndin 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum til fundin 2. oktober og biðja um eina ætlan fyri nýtslu av stykkjunum við tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Vísandi til, at 1. byggistig er liðugtgjørt, og at søla av øllum stykkjunum er komin uppá pláss, mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til at nevndin góðkennir matrikuleringætlanina fyri 1. byggistig sambært kortskjal dagfest 30.10.2006, jr.nr 2001-1314.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Í sambandi við útstykkingina á Skarðshjalla, má kommunan keypa 375 m² frá Búnaðarstovuni.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa 375 m² fyri vanligan jarðarprís.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Tekniska umsitingin hevur latið gera tekniskt prosjekt. Tekniska umsitingin hevur eisini luttikið á nøkrum fundum millum umsitingina fyri keyp og sølu og keypararnar av teimum báðum stóru stykkjunum.

Í sambandi við prosjekteringina og samskifti við ráðgevan um arbeiði, viðgjørdi tekniska umsitingin – t.e. byggideildin og tekniska deild – teknisku viðurskiftini í málinum.

Niðurstøðan var, at tekniska umsitingin metti, at alt økið skuldi gravast av, spreingjast, planerast og kloakkerast beinanvegin, soleiðis at teir, sum skulu byggja ella hava bygt í økinum, verða ikki nervaðir av spreingi- og grevstararbeiði í fleiri ár frameftir, eftir at bygningar eru komnir upp at standa har inni (skjal 2001-1314/98).

Á fundum við teir báðar stóru keypararnar ynsktu teir at vita prísin fyri grundstykkini, um tey vóru gjørd byggibúgvin av kommununi. Á hesum grundarlagið var biðið um undirhondsboð frá tveimum teimum størstu annleggsentreprenørunum í Føroyum, Articon og J & K. Petersen.

| **Bjóðandi** | **Tilboðsupphædd (u. mvg)** | **Alternativt tilboð (u. mvg)** |
|---|---|---|
| Articon | 36.464.810,- | 29.948.891,- |
| J & K Petersen | 30.456.917,- | 28.820.948,- |
| Meting | 37.100.000,- | |

Lægsta tilboðið er munandi lægri enn metingin.

Viðv. meting av tilboðunum, og hvørja støðu tekniska umsitingin hevur viðv. hvussu arbeiði skal skipast, verður víst til notat í málinum (2001-1314/103).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

1. at leggja málið fyri byggi- og býarskipanarnevndina og fyri teknisku nevnd til viðgerðar
2. at stovna verður eigarafelag fyri økið, sum skal standa sum arbeiðsánari
3. at kommunan vegna eigarafelagið tekur av lægsta tilboðnum frá J & K Petersen og at byggibúningararbeiðið verður gjørt av einum av hesum tilboðsgevara
4. at fráboða øllum keyparunum um hesa avgerð og at senda teimum útkast til fyribils skeyti við prísi við fráboðan um, at teir verða bidnir um beinanvegin skrivliga at melda aftur um teir takað av ella ikki
5. at fáa møgulig broytingarynski viðv. kotum o.l. frá keyparum beinanvegin, soleiðis at arbeiðið kann lagast hareftir í tann mun tað ber til.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. august 2007:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Bjarti Mohr, samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Leivur Hansen, tekur støðu í fíggjarnevndini.

**Tekniska nevnd 28. august 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tekniska projektinum sambært tekningsyvirlitum skjal nr. 2007-2044/11 og 2007-2044/12.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at halda seg til samtyktina frá byggi- og býarskipanarnevndini 30. oktober 2006 og vísir til notat/teldubræv j. nr. 2006-0183/5, og at kommunan heldur seg til gjørdar avtalur við keyparar av vinnustykkjum.

Umboð fyri kommununa hava í longri tíð samskift við keypararnar av størru vinnustykkjunum í byggistiginum 2 og 3 á Skarðshjalla við støði í samtyktini hjá byggi- og býarskipanarnevndini, ið heimilar sølu av hesum sum óbyggibúnaði stykki.

Nú komið er á mál, hálsar tekniska umsitingin um í lýsing av málinum og leggur málið fyri byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd til viðgerðar.

**Fíggjarnevndin 29. august 2007:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 5. september 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Leivur Hansen, mælir býráðnum til:

1. at kommunan tekur av lægsta tilboðnum frá J & K Petersen og at byggibúningararbeiðið verður gjørt í einum av hesum tilboðsgevara
2. at fráboða øllum keyparunum um hesa avgerð og at senda teimum útkast til fyribils skeyti við prísi við fráboðan um, at teir verða bidnir um beinanvegin skrivliga at melda aftur um teir takað av ella ikki
3. at fáa møgulig broytingarynski viðv. kotum o.l. frá keyparum beinanvegin, soleiðis at arbeiðið kann lagast hareftir í tann mun tað ber til.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, vísir til gongdina í málinum og at selja pørtum størri vinnustykkir sum óbyggibúgvin.

**Býráðið 13. september 2007:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 27. september 2007:** Tikið av skrá.

**Býráðið 27. september 2007:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 3. oktober 2007:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2007:** Meirilutin, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til, at taka undir við meirilutatilmælinum frá fíggjarnevndini 5. september 2007.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, vísir á, at nýggjar upplýsingar eru í málinum, og mælir tí býráðnum til, at kommunan ger vegin og at keypararnir sjálvir byggibúna grundstykkini eftir einum leisti og eini tíðarfreist, sum kommunan setur.

**Býráðið 13. desember 2007:** Fyrst varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen

**185/07** **2006-2955**

**Fíggjarætlan 2007- eykajáttanir.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrislógini kann kommunustýrið, um neyðugt, veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.

Niðanfyri nevndu eykajáttanir eru játtaðar í fíggjarnevndini.

**a.** Við árslok 2006 vóru tilsamans 82.894 tkr. fluttar fram sum ikki brúkt játtan. Broytingin er rakstrarførd undir serligum upphæddum í roknskapinum 2006 og sett upp undir eginognini. Upphæddin kann sundurgreinast soleiðis:

Deildir undir blokkskipanini – sí granskoðaraprotokoll síða 227, pkt. 5.2

| Endamál | Hækking á konto | | Upphædd |
|---|---|---|---|
| Vegir og gøtur | 11 | tkr. | -636 |
| Umhvørvismál | 12 | - | 325 |
| Vatn og gøtuljós | 14 | - | -93 |
| Brennistøðin | 15 | - | 5.384 |
| Asfalt, ferðsla o.a. | 16 | - | -597 |
| Sløkkiliðið/verkstaðið | 19 | - | 2.152 |
| Hests skúli | 20 | - | 46 |
| Nólsoyar skúli | 21 | - | -54 |
| Velbastaðar skúli | 22 | - | -17 |
| Kaldbaks skúli | 23 | - | 115 |
| Kollafjarðar skúli | 24 | - | -952 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Kommunuskúlin | 25 | - | 316 |
| Venjingarskúlin | 26 | - | 48 |
| Eysturskúlin | 27 | - | -488 |
| Sankta Frans skúli | 28 | - | 64 |
| Hoyvíkar skúli | 29 | - | -159 |
| Argja skúli | 30 | - | 177 |
| Býarsavnið | 34 | - | 396 |
| Býarbókasavnið | 35 | - | 836 |
| Svimjihøllin | 36 | - | -350 |
| Stadionøkið | 37 | - | 2.129 |
| Frílendisdeildin | 38 | - | -133 |
| Heilsumál | 41 | - | 215 |
| Tannlæknastovan | 42 | - | 731 |
| Dagtilhald í Nólsoy | 44 | - | 105 |
| Nýútveganir | 63 | - | 4.007 |
| Íløgustuðul | 64 | - | 5.794 |
| Útskiftan av amboðum | 68 | - | 8.661 |
| Sethús | 81 | - | 1.256 |
| Onnur hús | 82 | - | -4.756 |
| Reguleringskonto | 66 | - | 3.164 |
| Íløgur | 90 | - | 51.959 |
| Barnaansing | | - | 3.249 |
| Framfluttar játtanir íalt frá 2006 | tkr. | | 82.894 |

**b. Eykajáttanir í 2007 av reguleringskonto:**

| | | |
|---|---|---|
| Arksam, endurgjald, 2001-2690 | tkr. | 255 |
| Kollafjarðar skúli, 2006-3428 | - | 480 |
| Gl. kirkjugarður á Argjum, 2006-1723 | - | 50 |
| Umhvørvisvikan, 2007-0467 | - | 80 |
| P/F Mark, endurgjald, 2000-3250 | - | 150 |
| WC í Mylnugøta, 2007-0064 | - | 300 |
| Inni á Gøtu, endurgjald, 2003-1470 | - | 248 |
| Skálatrøð, heildarætlan, 2007-1042 | - | 800 |
| Hegn á Hvítanesi, 2000-1630 | - | 180 |
| Játtað av reguleringskonto íalt | tkr. | 2.543 |

**Býráðið 22. november 2007:** Einmælt samtykt.

**2. viðgerð.**

**Býráðið 13. desember 2007:** Einmælt samtykt.

186/07 **2007-3456**

**Konto 82 Umsiting av bygningum/onnur hús**

Við árslok 2006 er sambært síðu 227 í grannskoðanarprotokollini tkr. 4.756 fluttar fram til 2007 sum meirnýtsla at taka av játtanini 2007.

Higartil í 2007 hevur tørvurin av viðlíkahaldi og dagføring av teimum áleið 115 bygningunum, kommunan eigur veri størri og meira kostnaðar mikil enn upprunaliga mett.

Tekniski stjórin og kommunustjórin mæla til at hækka konto 82 við kr. 4.5 mió., og at hækka konto 89 skattainntøkur við kr. 4.5 mió. við teirri grundgeving, at vavið og tørvurin á dagføring og umvæling av bygningum hjá kommununi ikki rúmar omanfyrinevndu framflyting, um virksemið við bygningum ikki skal steðgast av øðrum myndugleikum.

**Fíggjarnevndin 21. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 22. november 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**2. viðgerð.**

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Bjarti Mohr og Høgni Mikkelsen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

187/07 **2006-1340**

**Raðfesting av íløgum í smábátahavnir/smábátapláss.**

DHI hevur gjørt modelroyndir av bátahyli í Álakeri í sept./okt. 2006.

Í royndunum hevur dentur verið lagdur á, at umframt at tað skal vera kyrt í einari nýggjari bátahavn, skal kyrran í havnini í Tórshavn og í verandi bátahyli á Argjum ikki versna.

Úrslitið av modelroyndini, sum er komið, vísir, at tann rætningurin á brimgarðinum, sum gevur bestu kyrruna i Tórshavnar havn og nýggjum bátahyli í Álakeri, ger tað ókyrrari í verandi bátahyli á Argjum. Fyri at tað ikki skal gerast ókyrrari á Argjum, er neyðugt at leingja verandi brimgarð á Argjum.

Um brimgarðurin á Argjum verður longdur við 20 m, verður bátahylurin enn kyrrari enn hann er nú, men hetta gevur einki bátapláss.

Um brimgarðurin á Argjum verður longdur við 180 m, verður bátahylurin á Argjum enn kyrrari, enn um hann verður longdur við 20 m, og hetta gevur møguleika fyri 75 nýggjum bátaplássum.

Kostnaðarmeting er gjørd av ymiskum útbyggingrmøguleikum í Tórshavnar kommunu, sum útvega fleiri bátapláss.

| Stað | Bátapláss | Kostnaður |
|---|---|---|
| Álaker | 150 | 25,9 mió |
| Argir leingja brimgarð 20 m | 0 | 3,0 - |
| Argir leingja brimgarð 180 m og gerð av bátaplássum | 75 | 15,5 - |
| Gamlarætt hyl inn í lendið | 43 | 6,5 - |
| Gamlarætt hyl inn í lendið | 23 | 4,9 - |
| Signabø, verandi hylur | 50 | 2,7 - |

Í løtuni er tørvurin á bátaplássum nógv størstur í Tórshavn/Argjum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri og havnameistarin mæla til at leingja brimgarðin á Argjum við 180 m og at gera pláss fyri 75 bátum at fíggja av konto fyri íløgur í smábátahavnir fyri 2007, 2008 og 2009.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, havnanevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.
**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 5. februar 2007:** Samtykt at beina málið til umsitingina til víðari viðgerð.

**Havnanevndin 12. februar 2007:** Ein meiriluti Leivur Hansen, Annika Olsen, Høgni Mikkelsen og Jógvan Arge taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum, tekniska stjóranum og havnameistaranum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 1 mió. av íløgum í smábátahavnir til projektering og fyrireiking.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Fyrsta stigið at leingja brimgarðin á Argjum, og ger av tilhoyrandi bátaplássum og øki annars, er at søkja friðingarmynduleikarnar um loyvi.

Í §21 í løgtingslóg nr. 59 um verju av havumhvørvinum verður m.a. sagt *"Verkætlanir og virksemi á sjónum og fram við strondini, ið ávirka náttúru og umhvørvi munandi, kunnu ikki setast í verk uttan góðkenning frá landstýrismanninum."*

Fyri at tryggja okkum, at vit ikki bróta havumhvørvislógina, eigur landsstýrismaðurin at verða kunnaður um ætlanina, soleiðis at hann kann taka støðu til um útdýpingin kemur undir §21 í havumhvørvislógini.

Næsta stigið í ætlanini er at gera byggiprogram og skitsuuppskot.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til:
- at gera byggiprogram saman við teknisku umsitingini.
- at gera skitsuprojekt saman við ráðgevara.

**Havnarnevndin 12. november 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

188/07 **2006-1899**

**Val av býráðslimum til bygginevnd fyri Karlamagnussarbreyt sambært § 36 í kommunustýrislógini**

**Býráðið 13. desember 2007:** Vald vóru Katrin Dahl Jakobsen og Høgni Mikkelsen.

189/07 2004-1604

**Skriv frá Advokatskrivstovuni, dagfest 6. juli 2007, um góðkenning av viðtøkum fyri Eigarafelagið undir Kongavarða.**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla fíggjarnevndini og býráðnum til at góðkenna viðtøkurnar fyri Eigarafelagið undir Kongavarða.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við kommunustjóranum og leiðaranum á løgdeildini.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

190/07 2004-1691

**Byggjan av ítróttarbygningi (fimleikahallir) við norðara enda á Tórsvølli.**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Byggideildin hevur gjørt eitt uppskot til bygging av norðara skýli á Tórsvølli.

Uppskotið er ætlað sum eitt boð uppá, hvussu skýlisbygningur kann kombinerast við privatar og almennar funktiónir upp at einum almennum útirúmi í form av einum torgi. Umráðandi hevur verið, at bygningur og útirúm spæla saman á ein hátt, sum leggur upp til, at aðrar komandi byggingar í økinum styrkja "torgið", sum er ætlað at gerast eitt centralt øki í Havnini. Umráðandi hevur tískil verið, at stovuhæddin á allari bygging í økinum hevur eina almenna og eksterna funktión.

Somuleiðis eigur at verða lagt upp til ein byggistíl, sum kann førast aftur til økið og tað sermerktu funktión, sum økið er myndað av og virkar undir.
**Arkitektoniska sniðið**
Arkitektoniska sniðið er grundað á siðvænt stadionsbyggjarí tó soleiðis, at virksemið hjá ÍSF hevur myndað fasaduloysnir og innrætting.

ÍSF er sambandið hjá øllum sersambondunum og tískil myndað av fjølbroyttum virksemi og áhugamálum. Tó er tað eisini soleiðis, at ÍSF stendur sum felagsnevnara hjá øllum – leggur seg sum samlandi karmur um sersambondini.

Hesin metafysiski áskoðanarhátturin er grundarlagið undir fasaduloysnini, har roynt er at leggja áherðslu á konstruktiónir sum rammur um hølisinndeilingina, við øllum sínum

skrivstovum til sersambondini og ymiskum funktiónum, sum sleppur at markera seg úti í fasaduni.

Norðara tribuna á Tórsvølli
- til alment endamál er í miðhæddini út til “ ítróttartorgið”
- skrivstovuøkið er á 1. hædd
- ítróttarrúm eru í niðastu hædd

**Ásetingar fyri økið:**
Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

Økið í Gundadali kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.

Býráðið kann áseta í pørtum av grundumráði 1, 2 og 3, at ongar skrivstovur ella líknandi virksemi verður í veghædd.

Fyri at tryggja eitt alment myndað umhvørvi í økinum framyvir verður skotið upp, at ásetingar verða lisnar í skeytini, um at at ítrottar-, resturantións-, handils- og mentuna-virksemi skulu verða í veghædd.

Eisini er ætlanin at arbeiða víðari við at útgreina tey øki/bygningar, ið skulu verða umfatað av hesum reglum.

**Funktión:**
Nýggja norður tribunan á Tórsvølli er ætlað sum ein blandaður skrivstovu- og almennur bygningur.

Ovasta hæddin er til skrivstovur til tey ymisku ÍSF sambondini. Vegginir eru uppbygdir í modulum, og tískil er møguleiki at flyta veggir, um tørvurin á skrivstovuhølum broytist við tíðini.

Miðhæddin er til almenn endamál, sum t.d. ítróttarsavn ella líknandi. Miðhæddin er opin og skal ætlandi virka sum ein týdningarmikil partur av nýggja “ ítróttartorginum” .

Niðasta hæddin skal rúma hallartengt ítróttarvirksemi. Rúm verður fyri fimleikahøllum og skiftingarhølum. Tey ymisku ítróttarsambondini hava stóran tørv á goymslurúmum, og tískil eru eisini tvey stór goymslurúm í kjallarahæddini.

**Frágreiðing av konstruktión:**
Teir berandi veggirnir í niðastu hæddini eru stoyptir á staðnum. Hetta er orsakað av, at kjallarin fyri ein stóran part er undir jørð, og tískil er trýstið stórt.

Mið- og 1. hæddin er bygd sum ein súlu/bjálka konstruktión. Súlur og bjálkar eru úr beton og berandi í facaduni. Hetta gevur møguleika at facadan verður bygd sum ein løtt, ikki berandi, stál / glas konstruktión.

Dekkið er ætlað sum spenndekk elementir. Spenndekk elementir hava eina stóra spennivídd, og er hetta sera týdningarmikið fyri at fáa eina fleksibla innrætting.

Takið er uppbygt av stálbjálkum, ið skulu bera eina lætta takkonstruktión.

Høvuðsinngongdin til bygningin er kjarnan í bygninginum. Tað er bygt upp við beton elementum og er berandi fyri vind trýstinum, ið er á bygningin.

Tey berandi elementini í bygninginum skulu ikki bert hava eina statiska funktión, men skulu eisini verða dekorativ.

Hetta gevur bygninginum dám av einari léttari konstruktión, ið fellur væl í umhvørvið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 300.000,00 av íløgum til byggiskrá.

**Mentamálanevndin 14. juni 2005:** Samtykt at seta ein arbeiðsbólk at gera byggiskrá til bygging av ítróttarbygningi at hýsa m.a. fimleikahallir í norðara enda av Tórsvølli. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við umboðum fyri teknisku fyrisitingina og trivnaðarfyrisitingina.

Í sambandi við byggiskrá fyri bygningin skal hetta gerast í samstarvi við avvarðandi partar og feløg.

Byggiskráin verður at leggja fyri nevndina 19. oktober 2005.

Samtykt at seta kr. 300.000,00 av íløgunum til ger av byggiskrá.

Málið verður lagt fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.
**Býráðið 23. juni 2005**: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna byggiskránna, dagfest oktober 2005, sum verður løgd fram á fundinum.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2005:** Málið varð framlagt av Robert Thomassen, arkitekti, og verður viðgjørt á einum seinni fundi.

**Mentamálanevndin 25. oktober 2005:** Nevndin viðgjørdi byggiskránna, og sendir hana, smb. Politisku-fyrisitingarligu mannagongdini,

- í byggi- og býarskipanarnevndina at viðgera og góðkenna økið,
- í teknisku nevnd til viðgerð og góðkenning av tekniska partinum og
- í fíggjarnevndina at útvega lendi.

Síðani verður málið lagt fyri mentamálanevndina aftur, at taka støðu til byggiskránna og útbjóðingarhátt.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at góðtaka byggiskránna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna byggiskránna, og at kunna grannarnar.

**Ískoyti:**
Málið verður viðgjørt á fundi í ferðslunevndini 9. november 2005. Býarverkfrøðingurin kemur við tilmæli á fundium í teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at í byggiskránni fyri fimleika bygging við Tórsvøll, skulu framtíðar ferðslu- og parkeringsviðurskiftini verða frá økinum norðan fyri ÍSF-húsini. Verður bundið í verandi pláss norðan fyri Svimjihøllina, verður atkomuligt til HB- og B36 húsini.

Mælt verður eisini til at eingin almenn ferðsla eigur at verða á økinum við nýggja Torgið. Tó skal sjúkraflutningur og annar bráðfeingis flutningur at verða loyvdur á økinum.

**Tekniska nevnd 23. november 2005:** Nevndin samtykti at beina málið aftur í arbeiðsbólkin, sum settur varð av mentamálanevndini 14. juni 2005, við ynski um at fáa eina ítøkiliga vegatekniska loysn við kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við nevndina fyri Grunnin Tórsvøll, sum er sinnað at leiga nøktandi lendi til ítróttabygging og at gera leiguavtalu.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at gera avtalu við Grunnin Tórsvøll um leigu av neyðugum lendi.

3 Býarverkfrøðingurin hevur á fundi við arbeiðsbólkin umrøtt spurningin um ymsar vegatekniskar loysnir. Greitt verður frá málinum á felagsfundi millum mentamálanevndina og teknisku nevndina.

**Tekniska nevnd 8. desember 2005:** Nevndin samtykti at viðmæla fyriliggjandi byggiskrá.

Nevndin samtykti eisini, at umsitingin letur gera uppskot til vegatekniska loysn at leggja fyri nevndina aftur.

**Mentamálanevndin 8. desember 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna byggiskránna og at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta 500.000,- kr. Til projektering.

**Ískoyti**
Í sambandi við at kommunan støðugt arbeiðir við at menna leistin fyri hvussu byggimál hjá kommununi skulu skipast, og havandi í huga, at tað í hesum sambandi, er umráðandi at ymiskar royndir verða gjørdar, so at valmøguleikar í sambandi við útbjóðing av arbeiðum í kommununi, eru sannførandi og so nógvir sum gjørligt, mælir býararkitekturin til at býráðið umhugsar annan leist enn tann, ið er umrøddur í mentamálasamtyktini 8. des. 2005.

Ístaðin fyri at lata gera prosjekt at lata til virkir at bjóða eftir, metir býararkitekturin at nevnda bygging er vælegnað til at lata gera sum heildararbeiðstøku (totalentreprisu), har kommunan við støðið í byggiskránni bjóðar 4- 5 virkjum at gera uppskot til loysn. Tó skal ein slík loysn gerast sum samskipar arbeiðið við Tórshavnar kommunu og Tórsvøll. Hetta eigur tó ikki at vera nøkur forðing, og kann avgreiðast við innleiðandi samskifti, har fortreytirnar fyri snið og funktión verður útgreinaðar beinanvegin.

**Tilmæli:**
Grundað á omanfyrinevnda, mælir býararkitekturin til at arbeiðið at gera fimleikabygging við norðurendan av Tórsvøll, verður framt sum heildararbeiðstøka bjóðað út millum 3 føroysk virkir og 2 útlendsk virkir fyri at tryggja kapping við atliti til eitt fyri Tórshavnar kommunu nøktandi kostnaðarstøðið. Í hesum sambandi eigur kommunan tó at tilskila sær rætt til ikki at taka av nøkrum av tilboðunum, men má tá gera sær greitt at talan er tá um at arbeiði ikki kann bjóðast út aftur í tíðarskeið uppá 6 mðr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum hjá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 14. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti Bjarti Mohr mælir til einans at bjóða arbeiðið út millum føroyskar fyritøkur, men tekur annars undir við tilmælinum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við meirilutatilmælinum í mentamálanevndini og at velja Hildur Eyðunsdóttir og Sjúrður Olsen í bygginevndina eftir reglunum í § 36 í kommunulógini.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Magnus Hansen, arkitektur, kunnaði um málið.

3 Meira tilfar kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Tikið av skrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at bygginevndin verður biðin um at útvega tilrættaða byggiskrá, um so er, at nevndin ynskir at broyta verkætlanina í mun til upplýsingarnar um broyttan hølistørv, sum eru fingnar til vega í samskiftinum við m.o. fimleikarfeløgini síðani fyriliggjandi byggiskrá frá oktober 2005. Talan er um eina fermetraøking á uml. 63 %.

Eisini verður mælt til, at málið um staðseting av fimleikarahøll við Tórsvøll verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd saman við heildarætlan fyri Tórsvøll, sum grunnurin fyri Tórsvøll hevur latið býráðnum.

**Mentamálanevndin 4. oktober 2006:** Samtykt at biðja tekniska stjóran og býararkitektin ummæla nýggja uppskotið, dagfest 27. september 2006, til fimleikabygging v.m. við Tórsvøll til næsta fund.

**Mentamálanevndin 29. november 2006:** Jákup Egholm Hansen, tekniskur stjóri og Mikael Viderø, býararkitektur, løgdu fram ummæli – fimleikahøll við Tórsvøll, dagfest 29. november 2006.

Samtykt at kanna møguleikan at byggja fimleikabygning til amboðs- og rútmiskan fimleik á einum øki við Landavegin, sum er avlagt til ítróttarendamál. Eisini samtykt at hesin møguleiki skal viðgerast saman við fimleikafeløgunum, og at atlit skulu takast til altjóða krøv.

**Ískoyti:**
Byggideildin hevur endurskoðað ætlanina um at byggja fimleikabygning við norðara enda av Tórsvølli og gjørt uppskot til nýggja skitsu. Uppskotið er grundað í byggiskránni og leystlig kostnaðarmeting er innanfyri upprunaligu metingina.

Bygginevndin tekur undir við uppskotinum og hevur avgjørt at leggja málið til mentamálanevndina til kunningar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gjøgnumføra tilmælið hjá býararkitektinum frá 14. desember 2005.

**Mentamálanevndin 17. apríl 2007:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at góðkenna byggiskránna fyri fimleikabygging við Tórsvøll.

Víst verður samstundis til býráðssamtykt 15. desember 2005 um útbjóðingarhátt og nevndarval.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. apríl 2007:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 14. november 2007:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Inn komu 2 uppskot. MT Højgaard og Articon/Pihl lótu inn tilfar.

*Prísirnir á uppskotum*
Uppskotið hjá MT Højgaard er áljóðandi kr. 44.986.106,- uttan MVG og ókent
Uppskotið hjá Articon/Pihl er áljóðandi kr. 53.625.000,- uttan MVG og ókent

*Vinnandi uppskotið*
Bygginevndin staðfesti úrskurðin hjá Dómsnevndini. Dómsnevndin metti, at uppskotið hjá MT Højgaard er eitt gott svar uppá ynskini hjá Tórshavnar kommunu til Fimleikabygging, og góð loysn fyri einum framtíðar Tórsvølli og Ítróttartorgið móti Svimjihøllini.

*Fundir við áhugabólkar*

Bygginevndin hevur havt fund við umboð fyri grunnin fyri Tórsvøll og fimleikarafeløgini, har hesi fingu høvi at gera sínar viðmerkingar.

Umboðini fyri fimleikarafeløgini vóru væl nøgd við uppskotið og høvdu einki at finnast at.

Umboðini fyri grunnin fyri Tórsvøll gjørdu millum annað vart við, at spurningurin um goymslupláss til Tórsvøll ikki var loystur í uppskotinum frá MT Højgaard.

Sambært byggiskránni var innteknað økið til goymslu til Tórsvøll í einum Hornabygningi. Hesin hornabygningur og goymsla vóru ikki undir yvirlitinum undir Evni og vídd punkt 4.4, men bert sum diagramm saman við tekningunum.

Um Tórsvøllur skal hava goymslu í hornabygninginum, eigur ein samráðing av fara fram við MT Højgaard.

Umboðini fyri grunnin fyri Tórsvøll vístu eisini á, at ikki er neyðugt við fleiri áskoðaraplássum.

**Tilmæli:**
Bygginevndin biður um heimild til at loyva umsitingini, at samráðast við MT Højgaard um ein sáttmála til bygging av Fimleikabygningi við Tórsvøll, sum skal taka støði í innkomna uppskotinum, har hædd verður tikin fyri manglum í mun til byggiskránna og viðmerkingum frá grunninum fyri Tórsvøll.

**Mentamálanevndin 28. november 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini, tó soleiðis at bygginevndini verður heimilað at samráðast saman við umsitingini.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**191/07** **1999-0366**

**Viðvíkjandi uppskoti til broyting í §14 stk. 3 í upptøkureglunum til dagstovnar og dagrøktina í Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Fyri at lætta um fíggjarliga hjá smábarnafamiljum eru ætlanir um at broyta systkina-avsláttin frá at foreldur gjalda fult gjald fyri dýrasta plássið og 75% fyri systkini, til at foreldur rinda 75% fyri dýrasta plássið og fult gjald fyri tað bíligasta plássið.

Harumframt hevur kommunan í hyggju at rinda 75% av rakstrinum á dagstovnunum. Hetta merkir, at foreldrini rinda 25% av rakstrinum og foreldragjaldið fer niður við 5%.

Ætlanin er at henda skipan skal koma í gildi 1. januar 2008.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri Børn og Ung mæla mentamálanevndini til at broyta §14 stk. 3 í upptøkureglunum til dagstovnarnar og dagrøktina í Tórshavnar kommunu soljóðandi:

**Stk. 3.** Hava foreldur fleiri børn í ansing, gjalda tey fult gjald fyri bíligasta plássið og 75% fyri dýraru plássini.

Harumframt mæla omanfyristandandi mentamálanevndini til at góðkenna – við heimild í § 6 í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt frá 1. juli 2000, ið er soljóðandi:

Avvarðandi kommuna og foreldur rinda tær útreiðslur, sum standast av virkseminum sambært hesi lóg. Foreldragjaldið skal tó í mesta lagi vera 30% av rakstrarútreiðslunum. Tó rindar kommunan 100% av húsaútreiðslunum

At kommunan rindar 75% av rakstrinum á dagstovnunum frá 1. januar 2008 at rokna.

**Mentamálanevndin 28. november 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2007:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 13. desember 2007:** Einmælt samtykt.

**192/07** **2005-3141**

**Endurskoðan av bussleiðini.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
P/F Mouritsens Bussar hava í skrivi, dagf. 17. november 2005, bjóða sær til at víðka um bussleiðina. Greitt verður frá uppskotinum, sum tekur støði í at:

1. Víðka verandi koyring á leið 1, 2 og 3 til tvær ferðir um tíman á kvøldi gerandisdagar umframt at bussarnir koyra eina ferð um tíman um kvøldið leygar- og sunnudag.

2. Uppskotið fevnir eisini um nýggja koyring fyri at økja um títtleikan á leið 1, 2 og 3 frá tvær ferðir til tríggjar ferðir um tíman í dagtímunum gerandisdagar.

**Fíggjarlig viðurskifti.**

1. Víðka verandi koyring á leið 1, 2 og 3.
   Kostnaðurin fyri hesa koyring er álj. Kr. kr. 318,- pr. Tíma ella íalt kr. 1.962.378,- árliga (u/mvg) ella **2.085.026,03** árliga íroknað 6,25% mvg.

2. Nýggja koyring
   Kostnaðurin fyri hesa koyring er álj. Kr. 519,- pr. Tíma ella íalt kr. 3.970.350,- árliga (u/mvg) ella **4.218.496,88** árliga íroknað 6,25% mvg. Orsøkin til henda einleikaprís er at neyðugt er at útvega 3 nýggjar bussar til endamálið, vísandi til at verandi busspark ikki nøktar tørvin. Einleikaprísurin er harumframt gundaður á at bussarnir verða fult avskrivaðir í sáttmálaskeiðnum, ið eftir er, tvs. Til tann 1. februar 2010.

Nýggj koyring – alternativt uppskot.
Um Tórshavnar kommuna yvirtekur teir 3 bussarnar eftir lokið sáttmálaskeið tann 1. februar 2010 fyri kr. 3.300.000,- (sum er 8/12 av keypsprísinum áljóðandi 1.650.000,- tá bussurin verður avskrivaður á 12 ár). Hetta merkir at árliga gjaldið fyri nýggju koyringina lækkar við kr. 818.550 u.mvg (ella kr. 869.709,38 íroknað 6,25% mvg). Soleiðis verður kostnaðurin fyri hesa koyring álj. Kr. 412,- pr. Tíma ella íalt kr. 3.151.800 árliga (u/mvg) ella **3.348.787,50** árliga íroknað 6,25% mvg.

Støða skal takast til innkomið tilboð frá P/F M.B. Bussum og um farast skal undir at endurskoða bussleiðina.

**Tilmæli:**
Vísandi til at ynski er at fáa bussleiðina at koyra eftir nýggju skipanini til 1. juli 2006 mælir býarverkfrøðingurin til, at sett verður fólk av at taka sær av hesi uppgávu beinanvegin, soleiðis at ítøkiligt uppskot verður at leggja fyri nevndina aftur í mars 2006. Býarverkfrøðingurin mælir harumframt til at

1. tikið verður av tilboðnum hjá P/F M.B. Bussum um víðkan av verandi koyring á leið 1, 2 og 3 álj. Kr. 2.085.026,03 árliga íroknað 6,25% mvg.
2. tikið verður undir við alternativa tilboðnum um nýggja koyring kr. 3.348.787,50 árliga íroknað 6,25% mvg.

**Tekniska nevnd 8. desember 2005:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Jógvan Arge, samtykti at endurskoða bussleiðina beinanvegin, soleiðis at ítøkiligt uppskot verður at leggja fyri nevndina aftur í mars 2006. Arbeiðið verður fíggjað av konto 03-2070.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við uppskotinum, vísandi til at ov fáar klagur eru um bussleiðina og at hetta er somikið kostnaðarmikið, at hetta eigur at bjóðast út av nýggjum, tá sáttmálaskeiðið er runnið í 2010.

3 Kunnað verður um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 4. mai 2006:** Frank Jacobsen legði fram frágreiðingina frá arbeiðsbólkinum.

Nevndin samtykti, at umsitingin arbeiðir víðari við framlagda uppskotinum um alternativa leið og kostnaðin av hesum at leggja fyri nevndina aftur. Nevndin ynskir, at umsitingin útgreinar kostnað fyri skúlabarnakoyringingina í sambandi við víðari viðgerðina av endurskoðanini av bussleiðini.

Umsitingin hevur biðið um tilboð frá báðum arbeiðstakarunum Gundurs Bussum og Mouritsens Bussum. Málið verður lagt fram á fundinum. Tað er ikki eyndast umsitingini at útgreina kostnað fyri skúlabarnakoyringingina í sambandi við víðari viðgerðina av endurskoðanini av bussleiðini.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir nevndini til at taka støðu til framløgdu tilboð.

**Tekniska nevnd 26. juni 2006:** Málið umrøtt.

**Nýtt:**
Marin Katrina Frýdal, formaður í teknisku nevnd, ynskir í sambandi við endurskoðanina av bussleiðini m.a. at viðgera spurningin um, hvørt tað kundi verið ein gongd leið at innført ókeypis busskoyring, sum lið í strembanini eftir at økja um nýtsluna av bussunum og samstundis at flyta nakað av privatbilferðsluni yvir á kollektivferðsluna.

Heldur enn at víðka verandi bussleið, kundi verði sett í gildi ókeypis busskoyring í fyribils eitt ella tvey ár sum royndartíð, galdandi frá 1. januar 2007. Soleiðis hevði borið til at eggjað borgarunum til at brúka bussarnar, og ikki minst at ala børnini til á ein náttúrligan hátt at brúka bussarnar heldur enn at verða koyrd til og frá skúla, ítrótti, frítíðarvirksemi o. ø.

Ókeypis busskoyring fer at elva fólki til at brúka bussleiðina meira, og næsta stigið eigur at verða at økja um títtleikan, tí tástani kann bussleiðin gerast eitt veruligt alternativ til privatbilin. Ein slík skipað tilgongd kundi verið við til at minka um bilatalið í býnum, og um ta alsamt veksandi ferðsluna í kommununi. Færri tal av bilum fast í býnum um dagarnar hevði somuleiðis bøtt um parkeringsmøguleikarnar.

Um fyrimunir og royndir aðrastaðni verður víst til frágreiðing frá Teknologirådet í Danmark, um "Gratis offentlig transport", har sagt verður m.a.:
"Der er bred enighed blandt sagkyndige om, at der er samfundsøkonomiske fordele at hente ved at flytte en del af privatbilismen over i offentlig transport. Enkelte vurderer endda at samfundet som helhed vil tjene på at gøre den offentlige transport gratis. Ikke i form af et direkte konkret afkast, men udfra en helhedsorienteret og langsigtet

samfundsøkonomisk vurdering, hvor de manglende billetindtægter opvejes af en reduktion af udgifter på andre områder.

Ved at reducere privatbilismen reduceres nemlig samtidig de negative afledte effekter og dermed også udgifterne til dem. Det er effekter som ulykker, luftforurening, CO2-udslip/klimaeffekt, ressourceforbrug (olie), støj, trængsel, udbygning og vedligeholdelse af infrastruktur."

Billettmaskinurnar hjá bussleiðini eru avoldaðar og slitnar. Tí stendur ein stór íløga fyri framman til slíka útgerð, um billettskipanin verður varðveitt.

Verður billettskipanin slept, fáa bussførararnir ivaleyst munandi betur stundir til økta kundatænastu og betri ferðslutrygd.

Harumframt skal støða takast til um kommunan skal lata gera faldarar til verandi leiðir.

**Tekniska nevnd 2. november 2006:** Í eini roynd at tálma støðugt vaksandi ferðslutrýstinum í kommununi og at fáa økt um nýtsluna av Bussleiðini mælir ein meiriluti**,** Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Leivur Hansen, býráðnum um fíggjarnevndina til, at verandi busskoyring verður ókeypis fyribils í eitt ár sum royndartíð, galdandi frá 1. januar 2007. Meirkostnaðurin fyri hesa tænastu verður uml. 3,5 mió. kr. og verður heitt á fíggjarnendina um at taka hetta upp í sambandi við 2. viðgerð av uppskotinum um fíggjarætlan fyri 2007.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, tekur ikki støðu til málið vísandi til at einki tilmæli er frá umsitingini og at fíggjarætlanin innan tekniska økið fyri 2007 longu er samtykt av teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Umrøtt og verður tikið uppaftur í.s.v. 2. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2007.

**Fíggjarnevndin 13. november 2006:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 16. november 2006:** Atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

3 Nú ókeypis busskoyring hevur verið fyrsta ársfjóðring 2007 og staðfest er, at tali á ferðandi er nógv økt, ynskir formaðurin í nevndini, at nevndin tekur støðu til nýtt uppskot um víðkan av bussleiðini. Játtan til víðkan av bussleiðini er ikki sett av á fíggjarætlanini fyri 2007. Umsitingin kemur saman við umboðum frá P/F M.B Bussum at greiða frá uppskotinum.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2007:** Umboð fyri P/F Mouritsens Bussum greiddu frá uppskoti og tilboði um víðkan av maskinparkini til bussleiðina í sambandi við møguligan øktan títtleika av túratalinum.

Ein meiriluti, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov, samtykti, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við málinum vísandi til at ongar kanningar eru gjørdar í umsitingini og heldur seg tískil til galdandi sáttmála.

**Nýtt:**
Umsitingin hevur saman við granskoðara latið gera eina meting av fyriliggjandi uppskoti og tilboð um ætlaðu víðkanina av maskinparkini til bussleiðina. Umboð frá grannskoðaravirkinum Spekt koma saman við umsitingini at greiða frá.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður undir við tilboðnum frá P/F M.B. Bussum.

**Tekniska nevnd 10. mai 2007:** Ein meiriluti, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal og Katrin Dahl Jakobsen, heitir á umsitingina um at kanna kostnað fyri keyp av brúktum bussum at leggja fyri nevndini til næsta fund.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen, mæla til at kommunan heldur seg til galdandi sáttmála.

**Nýtt:**
Umsitingin hevur sambært nevndasamtykt frá 10.mai 2007 kannað kostnað fyri brúktar bussar. Greitt verður frá kanningini.

**Tekniska nevnd 23. mai 2007:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, og Hildur Eyðunsdóttir, samtykti at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen, heldur seg til samtyktina frá 10. mai 2007.

**Nýtt:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við málinum sambært nevndarsamtykt frá 23. mai 2007

og leggur fram kostnað fyri nýtslu av brúktum bussum frá MB-Bussum.

Tilmæli kemur til fundin.

**Tekniska nevnd 7. juni 2007:** Ein meiriluti**,** Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen og Katrin Dahl Jakobsen, samtykti at taka undir við tilboðnum frá P/F M.B. Bussum, dagf. 5. juni 2007, álj. Kr. 3.873.354,- pr. Ár og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen, heldur seg til samtyktina frá 10. mai 2007.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Leivur Hansen og Hildur Eyðunsdóttir, mælir býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

Ein minniluti, Jan Christiansen, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 21. juni 2007:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Jan Christiansen í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Greiddu ikki atkvøðu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, sambært áheitan, biðið um tilboð uppá víðkan av Bussleiðini. Víðkanin tekur m.a. støði í trupulleikunum at halda tíðirnar, tá koyrt verður eftir Løgmannabreyt og Flatarvegnum. Hetta er serliga galdandi fyri leið 2 og 3. Við øktum títtleika á verandi rutum koma seinkingar á ávísum rutum, tá t.d. ferðslan er nógv, at gerast ein trupulleiki, um koyriætlanin skal haldast.
Trupuleikin er serliga eyðsýndur fyri koyringina á Vegnum Langa og til og frá bústaðarøkjunum oman fyri Vegin Langa. Eftir viðgerð av hesum trupulleika við Mouritsens Bussar er komið fram til, at frægasta loysnin er at innseta bussar á hesar rutur

sum eykakoyring ein part av degnum, gerandisdagar, serliga við atliti til skúlabørn. Mouritsens Bussar átóku sær sum eina fyribils loysn at koyra eftir Flatarvegnum og Løgmannabreyt, men tað vísir seg tíverri ikki at kunna halda á við verandi maskinpark. Bussførarar klára ikki at halda tíðarætlanina, teir fáa ikki ta hvíld, ið er neyðug orsaka av trongum koyriplani og hetta kemur at ávirka trygd og trivna hjá teimum, sum skulu nýta bussleiðina.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Kostnaðurin fyri hetta uppskotið til at nøkta skúlabarnakoyringina er kr. 0,6 mió árliga. Umframt hetta er eisini neyðugt at fíggja sendiútgerð uml. Kr. 200.000 og skelti til teir 4 bussarnar, ið býráðið samtykti 21. juni 2007.
Í sambandi við fíggjarætlan fyri 2008 er útgangsstøði tikið í tí sum býráðið samtykti 21. juni 2007, um at útvega 4 bussar afturat at seta inn á verandi leiðir til at økja um túratalið. Hædd er sostatt ikki tikin fyri kostnaðinum á kr. 0,6 mió. til omanfyri lýstu eykakoyring og heldur ikki fyri íløguni álj. Kr. 200.000 fyri sendiútgerð og skelti.

Vísandi til viðgerðina av ársfíggjarætlan fyri 2008 er neyðugt, at nevndin tekur støðu til, um fyriliggjandi útreiðslukarmur fyri Bussleiðina skal víðkast við kr. 0,6 mió., ella um peningurin skal finnast við skerjingum aðrastaðni í fíggjarætlanini, og um so er, hvar slíkar skerjingar skulu gerast.
Somuleiðis skal nevndin taka støðu til fyriliggjandi uppskot til koyriætlan fyri hesa eykakoyring.

**Tekniska nevnd 8. november 2007:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen og Katrin Dahl Jakobsen, samtykti at taka undir við hesi ætlan og heita á fíggjarnevndina um at víðka útreiðslukarmin fyri bussleiðina við kr. 600.000,-.

Meirilutin samtykti eisini at fíggja írestandi kr. 200.000,- fyri sendiútgerð og skelti av rakstri innan tekniskar veitingar.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, mælir til, at kommunan heldur seg til galdandi sáttmála.

**Fíggjarnevndin 14. november 2007:** Útsett til eyka fíggjarnevndarfundin 21. november 2007.

**Fíggjarnevndin 21. november 2007:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Heðin Mortensen og Leivur Hansen tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

Ein minniluti: Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen tekur undir við minnilutanum í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Tekniska nevndin samtykti 2. november 2006, at busskoyringin varð ókeypis fyribils í eitt ár sum royndartíð, galdandi frá 1. januar 2007, nevndin skal taka støðu til, um skipanin skal halda áfram

Umsitingin leggur fram nýggjar ferðafólkateljingar.

**Tekniska nevnd 29. november 2007:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Hildur Eyðunsdóttir, samtykti at mæla til at halda fram við ókeypis busskoyringini vísandi til góðu undirtøkuna sambært j. Nr 2005-31417/32 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen mæla til at halda seg til uppruna sáttmálan.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2007:** Ein meiriluti í fíggjarnevndini, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevndini.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen vísir til støðu sína í teknisku nevnd.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**193/07** **<u>2007-3530</u>**

**<u>Fíggjarstøðan viðv. Bussleiðini</u>.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við gjøgnumgongd av fíggjarstøðuni fyri raksturin av bussleiðini er staðfest, at játtanin fyri ársfíggjarætlanina 2007 ikki fer at halda, hetta orsakað av at hædd ikki er tikin fyri m.a. indexreguleringum fyri busskoyringini. Sambært ársfíggjarætlanin eru settar kr.10.980.000,- meðan framskrivaðu útreiðslurnar verða mettar til 12.236.933,-. Sostatt koma at resta uml. Kr. 1.256.933.

Umsitingin greiður frá og framskrivaðu tølini verða framløgd á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 1,3 av reguleringskontoini.

**Tekniska nevnd 29. november 2007:** Nevndin samtykti at beina málið í fíggjarnevndina til at útvega neyðuga meirjáttan.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at hækka konto 18, bussleiðin, við 1,3 mió. kr. at fíggja við meirinntøkum.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**194/07** **2007-1961**

**Nýggjur fólkaskúli á Hamrinum á Argjum**

Víst verður til mál, j. Nr. 2003-2394. Byggiskrá og betran av hølisviðurskiftinum av Argja skúli.

Víst verður til mál j. Nr. 2007-0069 viðv. Lendi.

**Á fundi 2. oktober 2006** á skrivstovuni hjá borgarstjóranum ynsktu Heðin Mortensen og Hildur Eyðunsdóttir, at býarskipanardeildin kannar, um møguleiki er at byggja ein skúla í tveimum sporum frá 1. til 9. flokk flokk við frítíðarskúla vestan fyri ítróttarøkið á Argjum ella uppi á Hamrinum.

Í brævi frá býarskipanardeildini dagfest 6. november 2006 er niðurstøðan:

**at** á Hamaranum er pláss bæði sunnanfyri og norðanfyri verandi stovn. Økið er ogn hjá Búnaðarstovuni og liggur í einum A3 øki.

**At** Økið vestan fyri Ítróttarøkið á Argjum er ogn hjá Búnaðarstovuni og liggur í 4. grundumráði. Tvs., at um hetta skal verða stovnsøkið, vil hetta krevja eina broyting av byggisamtyktini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla út frá teimum upplýsingum, sum nú eru í málinum, til at byggja ein skúla í tveimum sporum frá 1.-9. flokk við frítíðarskúla á Hamrinum á Argjum við barnagarðin.

Somuleiðis verður mælt til at byggiskráin verður endurskoðað.

**Mentamálanevndin 29. november 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 6. desember 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti, Jan Christiansen, mælir eisini til at taka upp samráðingar um møguligt keyp av posthúsbygninginum.

**Býráðið 14. desember 2006:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

**Uppískoyti:**
Byggiskrá fyriliggur nú og mælir bygginevndin til at góðkenna byggiskránna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at góðkenna byggiskránna. Eisini samtykt at biðja umsitingina kanna møguleikarnar fyri lendi til komandi svimjihøll afturat skúlanum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna byggiskránna.

**Býráðið 21. juni 2007:** Einmælt samtykt.

**Nýtt:**
Á bygginevndarfundi 27. november 2007 var samtykt, at leggja 2. part, sum er námsfrøiligur partur og 3. part, sum er tekniski parturin av byggiskránni fyri mentamálanevndina.

Viðmerkjast kann, at 1. partur av byggiskránni (politisk støðutakan) var samtyktur í mentamálanevndini 11. juni 2007. Í hesum parti er nevnt at alt arbeiðið verður framt í partalagi, eftir nærri ásetingum, sum umsitingin útgreinar.

**Tilmæli:**
Bygginevndin fyri nýggja skúlan á Hamrinum á Argjum heitir á mentamálanevndina, um at taka undir við 2. og 3. parti av byggiskránni.

Somuleiðis verður heitt á mentamálanevndina umvegis fíggjarnevndina at mæla býráðnum til at kr. 4.416.000, sum eftir er av áður játtaðum upphæddum til útbygging av Argja skúla, verða nýttar til projektering av nýggja skúlanum á Hamrinum á Argjum

**Mentamálanevndin 4. desember 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**195/07** **2002-2214**

**Áheitan frá kommunulæknunum í Tórshavnar kommunu um at fáa normerað 10. og 11. kommunulæknastarvið í Havn og um bygging av viðtaluhølum í Hoyvíks-haganum**.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Teir 9 kommunulæknarnir í Tórshavn hava við skrivi, dagfest 26. september 2002, skotið upp og kravt, at býráðið søkir landsstýrið um at skipa fyri tveimum kommunulæknastørvum aftrat í Suðurstreymi. Tað fyrsta í 2003 og tað seinna í 2005.

Víst verður á, at vanliga metanin í norðurlondum er, at ein kommunulækni skal vera fyri hvørji 1500 fólk.

**Sosiala nevndin 8. oktober 2002:** Nevndin tekur undir við áheitanini frá kommunulæknunum og samtykti at mæla býráðnum til um fíggjarnevndina at heita á trivnaðarmálaráðið um at normera tvey kommunulæknastørv aftrat í kommununi.

Eisini samtykt at heita á byggi- og býarskipanardeildina um at útvega øki til byggjan av læknamiðstøð til 4 læknar.

**Fíggjarnevndin 17. oktober 2002:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 24. oktober 2002:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Familju- og heilsumálaráðið hevur við skrivi, dagfest 8. januar 2003, boðað frá, at ráðið ikki hevur nóg stóra játtan á fíggjarlógini fyri 2003 til at ganga umsóknini á møti.

Lagt verður aftrat, at familju- og heilsumálaráðið arbeiðir við at finna eina varandi loysn fyri kommunulæknaviðurskiftini í Sandoynni, sum møguliga fær ávirkan á kommunulæknaviðurskiftini í Tórshavnar læknadømi.

Ein møgulig nýggj normering í Tórshavnar læknadømi kann tó í fyrsta lagi vera gjørd frá 1. januar 2004, treytað av at neyðug játtan er til taks á fíggjarlógini.

**Sosiala nevndin 4. februar 2003:** Nevndin varð kunnað um málið.

**Ískoyti:**
Við skrivi, dagfest 6. mai 2003, hevur familju- og heilsumálastýrið boðað frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at biðja um hægri játtan á fíggjarlógini fyri 2004 til kommunulæknaskipanina, til tess at tvey kommunulæknastørv aftrat kunnu normerast í Suðurstreymoyar Læknadømi. Treytað av, at nevnda meirjáttan fæst, kann umsóknin frá Tórshavnar kommunu gangast á møti.

**Sosiala nevndin 10. juni 2003:** Nevndin varð kunnað um skrivið frá familju- og heilsumálastýrinum og mælti til, at peningur verður settur av á komandi íløguætlan, so farið kann verða undir at gera byggiprogramm.

**Nýtt:**
Almanna- og heilsumálaráðið hevur við skrivi, dagfest 1. juni 2004, boðað frá, at ráðið nú hevur normerað tey umbidnu kommunulæknastørvini, men at hesi ikki verða lýst leys, fyrr enn Tórshavnar kommuna hevur viðtaluhøli til taks til teirra.

**Uppskot til innstilling:**
Sosialdeildarleiðarin og trivnaðarstjórin mæla til at fyrireikingar verða gjørdar til bygging av viðtaluhølum í Hoyvíkshaganum, har øki er lagt av til endamálið, og at peningur til byggingina verður settur av á íløguætlanini fyri 2005 og 2006.

Eisini verður mælt til, at bygningurin skal kunna hýsa 4 kommunulæknum, so læknin sum heldur til í J. Paturssonargøtu eisini fær viðtalu har, og at pláss verður fyri einum møguligum 12. kommunulækna einaferð í framtíðini.

Somuleiðis verður mælt til, at hølini verða soleiðis innrættað, at læknarnir, í tann mun tað yvirhøvur ber til, verða felags um og samstarva um hølini.

**Sosiala nevndin 7. september 2004:** Ein meiriluti, Beate L. Samuelsen, Heðin Mortensen, Torfinn Smith og Hildur Eyðunsdóttir, samtykti at taka undir við tilmælinum frá sosialdeildarleiðaranum og trivnaðarstjóranum og beina málið til teknisku fyrisitingina til gerð av byggiprogrammi og at játta kr. 150.000,00 av íløguætlanini 2005.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, metir ikki, at málið er búgvi at taka støðu til, og kann tí ikki taka undir við tilmælinum.

**Nýtt:**
Býararkitekturin setti 1. juni 2005 byggibólk at gera arbeiðsskrá. Í arbeiðsbólkinum eru Kári Finnson frá byggideildini, formaður, Eyðun Jensen, deildarleiðari og Selmar Nielsen, arkitektur, ráðgevi og skrivari.

Í kunngerð nr. 64 frá 29. september 2004 um støðið, viðlíkahald, rakstur v.m av viðtaluhølum hjá kommunulæknum, verður í § 1, stk. 4, nevnt, at kommunan eigur at vísa hóskandi umhugsni fyri møguleikanum hjá kommunulæknunum at arbeiða saman við øðrum fakbólkum innan primera heilsurøkt.

Vísandi til omanfyristandandi og at henda læknaviðtala í framtíðini skal servisera ein stóran býarpart, metir byggibólkurin og býararkitekturin, at umhugsað eigur at vera at leggja fleiri funktiónir innan heilsurøkt í sama bygningi, t.d tannlækni, fysioterapi, kiropraktor v.m.

Eisini metir byggibólkurin og býararkitekturin, at umhugsað eigur at verða, um bygningurin ikki eisini eigur at rúma tveimum íbúðum til frítíðar- og langtíðar-avloysarar, sum kommunan, sambært § 6, stk. 1, í løgtingslóg nr. 28 frá 23. apríl 1999 um kommunulæknaskipan, hevur skyldu at útvega frían bústað til.

Byggi- og býarskipanardeildin hevur víst á grundøki í nýggju útstykkingini í Hoy-víkshaganum, har mest loyvda bygging er tvær hæddir á um leið 960 $m^2$. Harav eru um leið 225 $m^2$ ein arkada, sum gongur ígjøgnum niðaru hædd á bygninginum.

Býarskipanardeildin hevur gjørt serligar ásetingar fyri miðstaðarbygging fram við Karlamagnussarbreyt, sum eru góðkendar av byggi- og býarskipanarnevndini. M.a. er ein áseting, at endin á bygninginum, sum vendir út ímóti vegnum og 6 metrar inn, skal hava eina útvenda funktión, t.d. handil, matstova v.m. Í sambandi við bygging av læknaviðtalu kundi hesin partur passandi verið eitt apotek.

Av tí at læknaviðtalan helst verður fyrsti bygningurin í miðstaðargøtuni í Hoyvík, metir býararkitekturin, at Tórshavnar kommuna eigur at leggja støði undir og verða fyrimynd fyri víðari bygging í økinum.

Byggibólkurin hevur latið gjørt arbeiðsskrá og kostnaðarmeting fyri viðtaluhøli til 4 kommunulæknar, sum verður lagt fyri nevndina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og býararkitekturin mæla til, at arbeiðssetningurin hjá byggibólkinum verður víðkaður, soleiðis at tað í bygninginum eisini verður møguleiki fyri øðrum funktiónum innan primeru heilsurøktina. Eisini verður nevndin biðin um at taka støðu til, um bygningurin eisini skal rúma tveimum íbúðum til frítíðar- og langtíðaravloysarar.

**Sosiala nevnd 12. desember 2005:** Málið varð umrøtt, og heitir nevndin á umsitingina um at kanna, um nakar áhugi er fyri at verða partur í verkætlanini.

**Nýtt:**
Fundur hevur verið við umboð fyri Landsapotekaran, sum í skrivi, dagfest 31. januar 2006, hevur boðað frá, at Apoteksverkið er áhugað at vera við í byggiætlanini við á leið 500 m².

Eisini verður sagt, at teirra politikkur higartil hevur verið, at Apoteksverkið eigur tey høli, tey eru í, og at Apoteksverkið er sinnað at verða við í projekteringini, treytað av at avvarðandi myndugleikar góðkenna endaliga projektið.

**Sosiala nevndin 7. februar 2006:** Samtykt at arbeiðssetningurin hjá byggibólkinum verður víðkaður, soleiðis at tað í bygninginum eisini verður møguleiki fyri øðrum funktiónum innan primeru heilsurøktina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og at játta kr. 150.000,00 til byggiprogramm og skitsuprojekt av íløgum og at velja bygginevnd.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Einmælt samtykt og at velja Elin Lindenskov og Bjarti Mohr í bygginevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur havt samskifti við ymiskar partar inna primeru heilsurøktina og metir, at Apotekið og heilsufrøðingarnir eru funktiónir, sum hóska væl inn í samanhangin.

Sambært § 11, stk. 2 í løgtingslóg frá 17. mai 2005 um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung, skal kommunan bera útreiðslurnar til viðtaluhøli hjá kommunulæknunum og heilsufrøðingunum. Umsitingin hevur havt fundir við leiðsluna fyri heilsufrøðingarnar, og eru tær áhugaðar í eini hølisloysn á veghæddini.

Apotekið er áhugað í at vera partur av verkætlanini við langtíðar leigu av um leið 550 m2 á veghæddini.

Bygginevndin og umsitingin hevur havt fleiri fundir við umboð fyri Yngru læknar, og ynskja teir, at læknaviðtalurnar verða bygdar sum eitt samanhangandi konsept við felags hølisnýtslu á øllum økjum.

Á fundi í sosialu nevnd tann 12.12.05 vóru byggitreytirnar fyri Karlamagnussarbreyt lýstar m.a. soleiðis, at mest loyvda bygging var 2 hæddir á 960 m2. Eftir at serstaka byggisamtyktin fyri økið er endaliga samtykt, er nú loyvt at byggja 865 m2 í 9,7 m hædd. Hetta gevur møguleika fyri at bygt verður í 3 hæddum.

Í viðgerðini av byggiskránni hevur bygginevndin valt at taka við 3 íbúðir til frítíðar- og langtíðaravloysarar á tilsamans 220 m2.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir sosialu nevnd til at taka undir við byggiskránni og umvegis fíggjarnevndini at mæla býráðnum til at játta 1.575.000 kr. til lendi og 3.000.000 kr. til projektering, sum verður boðin út millum ráðgevarar, og at endaliga verkætlanin verður boðin út í heildararbeiðstøku.

Somuleiðis mælir bygginevndin sosialu nevnd til at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at staðfesta staðsetingina, sum byggi- og býarskipanardeildina hevur víst á við Karlamagnusarbreyt í Hoyvíkshaganum, og á fíggjarnevndina um at útvega lendi.

**Sosiala nevnd 4. desember 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd, og at játta kr. 3.000.000,00 av íløgum 2008.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**196/07** **2007-3194**

**Ásetan av fundardøgum í býráðnum í 2008**

Umsitingin mælir til at hava fund hesar hósdagar, kl. 18.00:

| | |
|---|---|
| 31. januar | 26. juni |
| 28. februar | 11. september |
| 27. mars | 09. oktober |
| 24. apríl | 27. november |
| 29. mai | 18. desember |

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**197/07** **2002-2014**

**Keyp av lendi til rundkoyringina Eystari Ringvegur/Hvítanesvegur.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umráðandi er at fáa avgreitt ognarviðurskiftini við hesar eigarar

1) Jákup Sverra Joensen matr. nr. 1337
2) Tórbjørn Sørensen matr. nr. 1333a
3) Føroya landsstýri matr. nr. 1335

**Fíggjarnevndin 3. mars 2003:** Samtykt at taka upp samráðingar at útvega neyðugt lendi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, býarverkfrøðingurin o.fl. hava uttan úrslit samráðst við umboð fyri ánaran av matr. nr. 1337 um útvegan av neyðugum lendi og mæla tí til at ognartaka.

**Fíggjarnevndin 21. august 2003:** Samtykt at mæla býráðnum til at ognartaka uml. 435 m² av matr. nr. 1337, uml. 321 m² av matr. nr. eh og uml. 119 m² av matr. nr. 1333a.

**Býráðið fyri læstum hurðum 28. august 2003:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Vinnumálaráðið sigur í teldubrævi, dagfest 13. november 2003, at eykajáttanarlógin er samtykt í løgtinginum, og er landsverkfrøðingurin tí biðin at avgreiða søluna.

**Fíggjarnevndin 11. desember 2003:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa økið fyri kr. 22,00 pr. m² umframt kr. 4,00 pr. m² fyri vetrarbit, og um keypið kemur í drag at ognartaka.

**Býráðið fyri læstum hurðum 18. desember 2003:** Samtykt uttan atkvøðugreiðlsu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sent Vinnumálaráðnum skriv um keyp av lendi í sambandi við gerð av rundkoyring, fyri síðani at makabýta keypta lendið við eigaran Torbjørn Sørensen, sí j. nr. 2000-2014/84.

Í telefonsamrøðu við Niels Winther frá Vinnumálaráðnum er henda mannagongdin ikki røtt. Hann mælir til, at økið verður ognartikið til verkætlanina.

Nevndin skal taka støðu til:
1. um Tórshavnar kommuna skal ognartaka 400 m² frá Tórbirni Sørensen, so ætlanin kann førast út í verki.
2. um farast skal víðari at gera detajlprojekt.

3. um projekteringsarbeiðið skal bjóðast út til ymiskar ráðgevarar.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við at farið verður undir projekterings-arbeiðið at gera rundkoyringina.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at keypa umleið 400 fermetrar frá Føroya landsstýri at makaskifta við Tórbjørn Sørensen.

Tá keypið er avgreitt, verður heimilað umsitingini at fara undir projekteringsarbeiðið at gera rundkoyringina.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2006:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at taka upp samráðingar um útvegan av lendi.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at keypa umleið 400 ferm. frá Landsverki at nýta til gerðabýti til útvegan av øki til rundkoyringina.

Eisini verður mælt til at farið verður undir fyrireikingar til gerð av rundkoyring.

**Fíggjarnevndin 10. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 18. mai 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Býarverkfrøðingurin hevur havt fund við hjúnini Torbjørn og Aimée Sørensen, sum eru sinnað at gera eina avtalu um at makaskifta 200 ferm. við eitt byggibúgvið grundøki, eisini 200 ferm., t.d. á nýggju ætlaðu útstykkingini millum Hoyvíkshøllina og Mylnutjørn.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Býarverkfrøðingurin greiddi frá málinum.

Samtykt at bjóða Aimee og Tórbjørn Sørensen óbyggibúgvið grundstykki í Hoyvíkshag-anum fyri tað, tey lata (uml. 200 m²).

Í øðrum lagi samtykt at mæla býráðnum til at ognartaka lendið av matr. 1333a.

**Býráðið fyri læstum hurðum 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gera eina fyribils kostnaðarmeting (j. nr. 2006-1748/1).

Fyri at koma víðari í planleggingini av arbeiðinum er neyðugt at játtaðar verða kr. 540.000,00 íroknað mvg til projektering og eftirlit av arbeiðinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 540.000,00 av íløgum fyri vegir og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 5. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum, og at arbeiðið at projektera verður boðið út.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin mælir til at góðkenna uppskot til makaskiftisavtalu millum kommununa og Aimée og Tórbjørn Sørensen um lendið.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir uppskotinum til makaskiftisavtalu og at játta kr. 540.000 av íløgum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. oktober 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sambært samtykt í teknisku nevnd frá 5. oktober 2006 bjóðað arbeiðið út sum undirhondsboð til tveir ráðgevarar at projektering og eftirlit í sambandi við rundkoyringina Hvítanesvegur – Eystari Ringvegur. HMP Sp/f hevði lægra tilboðið áljóðandi kr. 245.000,- og kr. 550,- pr. tíma fyri eykaarbeiðið. LBF P/f bjóðaði kr. 361.048,- og kr. 600,- pr. tíma fyri eykaarbeiðið. Víst verður til TK j. nr. 2007-221/1 og 2.

Ráðgevin hevur gjørt projektuppskot nr. 1 og 2, sí TK j. nr. 2007-2920/1 og 3. Umsitingin hevur havt samráðingar við umboð fyri Jákup Sverra Joensen og talar alt fyri at TK fær eina loysn við eigaran um uppskot nr. 2 verður valt.

Umsitingin hevur havt ein fund við Landsverk um projektuppskotini og mælir Landsverk til, at projektuppskot nr. 2 verður framt í verki. Hallið á Hvítanesvegnum er minni á uppskoti nr. 2 samanborið við uppskot nr. 1.

Umsitingin hevur fingið loyvi frá Yvirfriðingarnevndini í sambandi við uppskot nr. 1. Uppskot nr. 2 kemur fyri á fundi í Yvirfriðingarnevndini 6. november 2007.

Neyðugt verður at keypa umleið 680 m² frá Føroya landsstýri, sí plantekning TK j. nr. 2007-2920/5.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at gera høvuðsprojekt grundað á projektuppskoti nr. 2. Eisini verður mælt til at beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið at játta pening til keyp av umleið 680 m² av lendi til endamálið.

**Tekniska nevnd 8. november 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og høgni Mikkelsen, mælir til at rundkoyringin hevur eitt tvørmát uppá 37 m ístaðin fyri 30 m.

**Ískoyti:**
Umsitingin ynskir, at støða skal verða tikin til um farast skal víðari við projekteringini av rundkoyringini ella um farast skal undir nærri kanningar av einum ferðslureguleraðum vegamóti.

Umsitingin hevur fingið eina meting og eitt tilmæli frá Rambøll og Nyvig, sí j.nr. 2007-3545/1, um hvør ferðsluteknisk loysn er best á vegamótinum Hvítanesvegur / Eystari ringvegur. Niðurstøðan bendir á, at ein ljósregulering í longdini er besta loysnin.
Ein rundkoyring klárar ikki at svølgja núverandi ferðslu, tá hon er upp á tað mesta. Við eini framtíðar øktari ferðslu, vil tað verða ein støðugur trupulleiki.
Greitt verður frá viðmerkingum frá ráðgevanum Rambøll og Nyvig, um fyrimunir og vansar at gera signalregulerað vegamót og rundkoyring

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla tí til steðga á við projekteringini av rundkoyringini og at fáa serfrøðingar at gera tekningar og kostnaðarmeting av ljósregulering fyrst.

**Tekniska nevnd 29. november 2007:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Hildur Eyðunsdóttir samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen mæla býráðnum til at gera eina rundkoyring sambært minnilutatilráðingini frá 8. november 2007.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2007:** Ein meiriluti, Jan Christiansen, Høgni Mikkelsen og Leivur Hansen mælir býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd 8. november 2007, tó soleiðis at rundkoyringin hevur eitt tvørmál uppá 37 m og at neyðugt lendi verður útvegað til endamálið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd 29. november 2007.

Ein annar minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðið 13. desember 2007:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá fíggjar-nevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Heðin Mortensen,

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Leivur Hanssen, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

## Mál uttan fyri skrá

**198/07** **2006-3613**

**Umsókn frá Juliannu Klett, adv. vegna Tórshavnar Golfklubba um broyting av byggisamtyktini fyri økið á Glyvursnesi, sum felagið hevur gjørt leiguavtalu við Búnaðarstovuna um. Økið er uml. 359.000 m$^2$ til støddar og partur av matr. nr. 2, Kirkjubøur.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar Golfklubbi hevur gjørt avtalu við Búnaðarstovuna um leigu av øki á Glyvursnesi. Økið, sum er uml. 359.000 m$^2$ til støddar og partur av festinum hjá Sjúrður Patursson, liggur beint eystan fyri Grótbrotið á Glyvursnesi.

Økið liggur sum landbúnaðarjørð og søkt verður um at tað verður broytt til D2-ítróttarøki

Búnaðarstovan hevur søkt Matrikulstovuna um frábýtan av økinum, soleiðis at økið fær egið matrikulnummar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 15. januar 2007:** Nevndin samtykti at senda málið til ummælis hjá Búnaðarstovuni.

**Nýtt:**
Málið hevur verði til ummælis hjá Búnaðarstovuni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 5. februar 2007:** Málið útsett.

**Uppískoyti:**
Eftir brævaskifti og fundir millum Búnaðarstovuna og umsitingina hevur kommunan nú móttikið eitt skriv, har Búnaðarstovan gevur viðmæli til at økið, ið Tórshavnar Golfklubbi leigar á Glyvursnesi, verður útlagt til D2-ítróttarøki sambært niðanfyri standandi skrivi frá Tórshavnar kommunu, dagf. 29. oktober 2007.

> *"Vísandi til fyrispurning frá Búnaðarstovuni tann 21/06/2006 skal Tórshavnar kommuna hervið vátta, at ætlaða broytingin av byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 2, Kirkjubøur, ið er leigaður Tórshavnar Golfklubba, ikki á nakran hátt ávirkar ella avmarkar møguleikarnar hjá festaranum/Búnaðarstovuni og Tórshavnar Golfklubba sínamillum at avtala, at økið skal nýtast til seyðabeiti.*
>
> *Hetta ger seg eisini galdandi, tá ið leigusáttmálin frá 26/10/2006 millum partarnar gongur út.*
>
> *At økið verður útlagt til D2-ítróttarøkið hevur sostatt onga ávirkan á, hvørt øki framvegis verður nýtt til seyðabeiti - eisini tey øki, har spælt verður, hóast økið er ítróttarøki og ikki landbúnaðarøki.*
>
> *Í tann mun Búnaðarstovan/festarin, Tórshavnar kommuna og Tórshavnar Golfklubbi í felag koma til ta niðurstøðu, at framhaldandi nýtsla av økinum til bæði seyðabeiti og golf ikki er sameiniligt og neyðugt er at hegna økið inni, finna partarnir fram til eina loysn viðvíkjandi endurgjaldi fyri mist bit eftir teimum reglum, ið tá eru galdandi."*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti og broyta økið á Glyvursnesi, sum Tórshavnar Golfklubbi hevur gjørt leiguavtalu við Búnaðarstovuna um, frá 4. grundumráði til D2-ítróttarøki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. november 2007:** Nevndin samtykti at útseta málið til komandi fund.

| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**13. desember 2007** | Blað nr.: **7284**<br>Formansins merki: |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti og broyta økið á Glyvursnesi, sum Tórshavnar Golfklubbi hevur gjørt leiguavtalu við Búnaðarstovuna um, frá 4. grundumráði til D2-ítróttarøki, við teirri treyt at møgulig ávirkan á økið av einum framtíðar flogvølli kann fremjast uttan kostna fyri kommununa, herundir uppsetan av útgerð ella bygging.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. desember 2007: S**amtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen. Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddi: Beate L. Samuelsen,

**FUNDUR LOKIN KL. 20:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |